# NORRIQ longur út í verð

**Føroyska KT-fyritøkan, NORRIQ, boðar í dag frá, at teir hava keypt Helios-IT, sum hevur støði í Belgia og Hollandi. Við hesum kemur NORRIQ inn á altjóða marknaðin**

**KUNNINGARTØKNI**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Bo Martinsen, stjóri í KT-fyritøkuni NORRIQ*

KT-fyritøkan NORRIQ er ein av leiðandi veitarunum innan loysnir, grundaðar á Microsoft Dynamics. Teir taka nú eitt avgerandi stig inn á altjóða marknaðin fyri ERP-loysnir.

Keypið av Helios-IT er fyribils krónan á verkinum í einum strategiskum frambroti á altjóða marknaðunum.

Í okkara leitan eftir fyrsta altjóða uppkeypinum hevur tað havt stóran týdning fyri okkum, at finna eina fyritøku, sum líkist okkara, bæði í ambitiónum, orku og kompetansu. Umframt stóran vøkstur hevur Helios-IT megnað at loyst heilt serligu avbjóðingina at menna nøktandi loysnir tvørtur av staðligum og altjóða marknaðum. Við hesum keypinum ætla vit at byggja víðari upp á framgongdina, sigur Bo Martinsen, stjóri í NORRIQ.

Helios-IT hevur fleiri enn 600 kundar, harav fleiri leiðandi fyrit-økur í bæði Europa og Asia. Teir hava ment viðurkendar loysnir innan flestu vinnuøkir, eitt nú til Carlsberg, til dømis Drink-IT, sum hevur latið upp eina røð av marknaðum innan drikkjuvøruídnaðin. Og við kundum sum Toyota og Mercedes hevur Helios-IT við sínum Drive-IT/ Incadea-loysn eisini sligið sína støðu innan bilídnaðin fasta.

Vit hava ment eitt høgt støði innan vertikalu loysnirnar á ERP-marknaðinum til stórar altjóða kundar. Vit eru sera fegin um avtaluna við NORRIQ, har vit verða framherjarnir í altjóða átakinum. Tað fer at lata upp stórar møguleikar hjá okkum, bæði tá tað kemur til verandi loysnir, og at menna nýggjar loysnir, og vit meta søluna av Helios-IT at vera heilt røttu loysnina til heilt røttu tíðina, sigur Alex Vandereycken frá Helios-IT.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av norði ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og møguliga regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, seinnapartin upp í ein strúk. Regn av og á og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 4 og 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 1 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 2 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -- |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 20 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | -2 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 5 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 26 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 24 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 984 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer suðureftir og grynnist.



**Í dag:**
Ein veikur hátrýstryggur skamt vestan fyri Føroyar verður yvir Føroyum mikumorgunin. Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og gevur lýggjari veður komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/12 kl. $06^{00}$ – 04/12 $06^{00}$. Hitin í gjár: °
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° - Mesti hiti máldur í november: 2,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 03/12 kl. $06^{00}$ – 04/12 $06^{00}$.
Avfallið higartil í desember: 26 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

29. november Mánin longst frá jørðini
5. desember Fyrra kvarter
12. desember Fullmáni/ Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. des | 2:58 | 15:22 | 1:58 | 14:22 | 2:13 | 14:37 | 4:58 | 17:22 | 5:58 | 18:22 | 1:13 | 13:37 | 0:13 | 12:37 | 3:13 | 15:37 | 4:13 | 16:37 | 2:43 | 15:07 | 3:58 | 16:22 |
| 10. des | 3:46 | 16:12 | 2:46 | 15:12 | 3:01 | 15:27 | 5:46 | 18:12 | 6:46 | 19:12 | 2:01 | 14:27 | 1:01 | 13:27 | 4:01 | 16:27 | 5:01 | 17:27 | 3:31 | 15:57 | 4:46 | 17:12 |
| 11. des | 4:39 | 17:09 | 3:39 | 16:09 | 3:54 | 16:24 | 6:39 | 19:09 | 7:39 | 20:09 | 2:54 | 15:24 | 1:54 | 14:24 | 4:54 | 17:24 | 5:54 | 18:24 | 4:24 | 16:54 | 5:39 | 18:09 |
| 12. des | 5:39 | 18:09 | 4:39 | 17:09 | 4:54 | 17:24 | 7:39 | 20:09 | 8:39 | 21:09 | 3:54 | 16:24 | 2:54 | 15:24 | 5:54 | 18:24 | 6:54 | 19:24 | 5:24 | 17:54 | 6:39 | 19:09 |
| 13. des | 6:39 | 19:10 | 5:39 | 18:10 | 5:54 | 18:25 | 8:39 | 21:10 | 9:39 | 22:10 | 4:54 | 17:25 | 3:54 | 16:25 | 6:54 | 19:25 | 7:54 | 20:25 | 6:24 | 18:55 | 7:39 | 20:10 |




